# Guðrun millum vinir



*Undir tryggum umstøðum og í góüm vinalag løddi Guðrun undan stóru finaluni í Forum.*
*(Myndam: Knút H. Nielsen)*

**Kvøldið fyri stóru finaluna í "Stjerne for en aften" í Forum, nýtti Guðrun S. Jacobsen í vinalag í danska høvuðsstaðnum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Stóra finalan í Forum í kappingini "Stjerne for en aften" er óiva¨ein hugsan, sum kann fáa hárini at reisa seg hjá finaluluttakarunum.

Kvøldið fyri stóru finaluna nýtti føroysku finalisturin Guðrun S. Jacobsen undir tryggum umstøüm í góðum vinalag í danska høvuðsstaðnum, eftir ein langan hósdag, við roynd-um í Forum.

Í prestagarï á Nørrebrúgv hittust føroyskt/danskt vinalag til ein betri bita. Í Føroyahúsinum er í kvøld. Leygarkvøld, sonevnt Suðuroyarkvøld, og í hesum sambandi vitjaðu eitt nú bólkurin Blanding, Torgerð Suðuroy, skemtari, og onnur í høvuðsstaðnum.

Eitt kvøld við einum betri bita og felagssangi og hugna. Í skrivandi stund er eingin sum veit finaluúrslitið, men Guðrun løddi undir tryggum umstøðum.


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Planleggingardeildin** er partur av byggi- og býarskipanardeildini í tekniskur fyrisitingini.

Á deildini starvast 12 fólk.

Sum arkitektur á deildini verður tú ein partur av einari eind, ið arbeiðir við nógvum, stórum og áhugaverdum uppgávum og verkætlanum.

Planleggingardeildin er ein sera virkin deild, ið hevur nógv samskifti við ráðgevar og stovnar bæði innan- og uttanlands.

Virksemið og arbeiðsøkini á deildini gevur støðuga menning, og bjóðar kommunan tí góðar búningarmøguleikar og førleikamenning

www.torshavn.fo

## Arkitektur til planleggingardeildina

Tórshavnar kommuna søkir eftir starvsfólki til planleggingardeildina at byrja skjótast til ber. Viðkomandi skal vera útbúgvin arkitektur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

**Arbeiðsøkini á planleggingardeildini eru í høvuðsheitum:**
- útstykkingarætlanir
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- sektorplanlegging
- verkætlanarskitsir og fylgja málum upp
- bygging av kommunalum bygningum
- luttaka í verkætlanum við eksternum ráðgevum
- samskifta við áhugabólkar, feløg, privatpersónar og stovnar

**Býráðið roknar við at umsøkjarin**
er útbúgvin arkitektur, ella hevur viðkomandi útbúgving, umframt at:
- hava royndir innan planlegging, projektering, eftirlit og umsiting.
- hava góðan kunnleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt Cad tekniprogram og/ella MicroStation).
- duga væl føroyskt, bæði í skrivt og talu.
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at leggja arbeiðið til rættis
- vera fyrikomandi og duga væl at arbeiða saman við starvsfólkunum á deildini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, leiðara ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. apríl 2003 kl. 13:00. Viðmerk á brævbjálvan "arkitektur til planleggingardeildina".


# Siloakórið á Svangaskarði

KÓR
*Jóannes Hansen*

Sunnukvøldið kl. 18 verður Siloakórið at hoyra í Ítróttarhúsinum á Svangaskarði. Tað er samkoman í Nebo á Toftum, sum hevur boðið kórinum úr Fuglafirði út á Toftir at syngja. Umframt kórsang verða solistar at hoyra saman við kórinum. Eftir fundin verður ein nátturðabiti bjóðaður øllum teimum, sum møta á Svangaskarði í annaðkvøld.

Siloakórið er mannað við umleið tredivu sangarum. Nógvir eru sjálvandi úr Fuglafirði, men sangarar eru eisini úr grannabygdunum Leirvík og Gøtu, og fleiri eru av Skálafjørðinum, eisini av Toftum.

Kórleiðari hjá Siloakórinum er Eyðun á Lakjuni, sum er tónleikalærari á Studentaskúlanum á Kambsdali. Kórið hevur sungið støðugt seinastu 15-16 árini. Undan jólum góvu tey fløgu út, sum hevur verið væl fagnað. Nú tað stundar fram ímóti sumrinum fer kórið at ferðast eitt sindur og syngja á fundum. Síðst í mai fara tey saman við sangbólkinum Salt at hava konsert í Mentanarhúsinumí Fuglafirði.

### Nýggjan sal

Samkomubygningurin hjá Nebo er næstan sjeyti ára gamal. Hann er víðkaður og hevur fingið ábøtur einar tvær ferðir, men hann er ikki nóg stórur og tíðarhóskandi til sovorna vitjan, sum í morgin verður úr Fuglafirði. Tí verður sangfundurin í ítróttarhúsinum á Svangaskarði, har tað ofta hava verið samkomur av hesum slagnum.

Kanska verður tað ikki so heilt leingi, inntil samkomur av hesum slagnum kunnu haldast í bygninginum hjá Nebo. Tey eru farin undir at byggja nýggjan sal í Flatabø, sum tað verður kallað á Toftum. Samkomubygningurin verður bygdur dygst uttanfyri, har Nes kommuna nú byggir eldrasambýli. Byggibúningin av samkomubygninginum er liðug, og teir hava stoypt tvær ferðir. Bygningurin ætlast at vera í tveimum hæddum. Tað er ikki greitt enn, nær bygningurin verður liðugur. Men tað verður miðjað eftir at inniloka niðaru hæddina í ár, verður sagt av Toftum.

# Bilasølan fyrsta ársfjórðing

TÍÐINDASKRIV

Av hesum sæst at sølan av privatbilum er minkað við sløkum 10 prosentum og at bilasølan sum heild er góð 4 prosent minni enn fyrsta ársfjórðing í fjør

Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri fyrsta ársfjórðing í 2003, samanborið við 2002.

| Akfaraslag | Mars 2003 | Mars 2002 | Broyting Mar 02/03 | Jan-Mar 2003 | Jan-Mar 2002 | broyting 2002/2003 | %broyting 2002/2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| Bussar | 2 | 2 | 0 | 2 | 4 | -2 | -50,00% |
| Hýrubilar | 1 | 2 | -1 | 5 | 7 | -2 | -28,57% |
| Lastbilar | 0 | 1 | -1 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Leguvognar | 1 | 0 | 1 | 3 | 1 | 2 | 200,00% |
| Motorsúkkla | 4 | 0 | 4 | 4 | 1 | 3 | 300,00% |
| Líkvognar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | |
| Persónbilar | 115 | 132 | -17 | 305 | 336 | -31 | -9,23% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | |
| Tangabilar | 3 | 0 | 3 | 3 | 0 | 3 | |
| Viðfestivognar | 4 | 1 | 3 | 16 | 14 | 2 | 14,29% |
| Vøruvognar | 25 | 24 | 1 | 74 | 69 | 5 | 7,25% |
| **Samlað** | **155** | **162** | **-7** | **415** | **433** | **-18** | **-4,16%** |

Tað eru skrásett 31 nýggj prutl í fyrsta ársfjórðingi 2003.

# Ætla at sameina seks kommunur í eina

TÍÐINDASKRIV

Fyri fyrstu ferð í Føroya søgu verður ein roynd gjørd at sameina 6 kommunur í senn. Higartil hava sameinigarnar snúði seg um eina og eina kommunu. Talan er um at sameina Hósvíkar-, Hvalvíkar-, Saksunar-, Haldórsvíkar-, Sunda- og Gjáar kommunu. Fólkatalið í hesum kommununum er umleið 1500.

Nevndin sum hevur arbeitt við málinum er nú komin so langt, at borgarafundir eru lýstir at vera. Tann 8. apríl eru fundir í Hósvíkar kommunu, Gjáar kommunu, Halvíkar kommunu og Saksunar kommunu. Tann 10. apríl eru fundir í Sunda kommunu og Haldórsvíkar kommunu.

Tann 29. apríl er felagsfundur fyri øllum borgarum úr øllum kommununum í Eydnuni á Oyrarbakka.

Treytin fyri at kommunustýrið er bundið av fólkaatkvøðuni er:

1. at tað í hvørjari einstakari kommunu eru fleiri enn 50% av teimum, sum greiða atkvøðu, atkvøða fyri og

2. at tær kommunur har meiriluti er umboða meira enn 70% av samlaða fólkatalinum í økinum

Lógartreytirnar fyri at ein sameining kann fara fram eru m.a. at sameinda kommunan skal hava eitt navn og ein kommunubygnað.

Navnið á sameindu kommununi verður Sunda kommuna og kemur at hava høvuðssæti á Oyrarbakka. Navnið er valt út frá tí at onki staðarnavn er beinleiðis bundið til navnið og at tað hoyrir til eina av verandi kommunum.

Talið á kommunustýrislimum verður 11 og tað verða 3 nevndir, fíggjarnevnd, teknisk nevnd og trivnaðarnaevnd.




# 25 ára hátíðarhald

**Leikhúsið Gríma**

framførir

## Per Gúnt

eftir Henrik Ibsen

leikstjórn Eyðun Johannessen

á Meiarínum

| | | |
|---|---|---|
| leygardagin | 5. apríl kl. 18.00 | |
| týsdagin | 8. apríl kl. 19.30 | |
| mikudagin | 9. apríl kl. 19.30 | Útselt |

Atgongumerki á kr. 125,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

Søkt verður eftir
## reingerðingsfólki
til dagstovnin í Sandavági

Søkt verður eftir 2 fólkum til reingerð 2,5 tímar/dag. Vaska verður við mikrofibrum (grønt umhvørvið).

**Lønarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir avtalu. Lønin verður sambært sáttmála hjá Føroya Arbeiðarafelag.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sandavágs kommunu, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi 14. apríl.

SANDAVÁGS KOMMUNA

**Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum**

## Ársaðalfundur

Mbf hevur aðalfund leygardagin 10. mai 2003 kl. 14.00 í Pállstovu.

Skrá smb. viðtøkum felagsins.

Mál, ið skulu viðgerðast á aðalfundinum, mugu verða starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn t.v.s. fríggjadagin 25. apríl 2003.

Møti fjølment.

**Starvsnevndin**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3531
**Navn:** Sp/f K. A.
**Hjánøvn:** Sp/f Kei-Grillin (Sp/f K. A.), Sp/f Grillin (Sp/f K. A.), Sp/f Grillin á Keiini (Sp/f K. A.), Sp/f Klaksvíks Grillin (Sp/f K. A.), Sp/f Norðoya Grill (Sp/f K. A.), Sp/f Norðgrill (Sp/f K. A.), Sp/f Pylsan (Sp/f K. A.), Sp/f Aurora (Sp/f K. A.), Sp/f Búffurin (Sp/f K. A.) og Sp/f KAT (Sp/f K. A.)
**Adressa:** Postbox 230, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 21.03.2003
**Viðtøkudato:** 21.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 150.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 150.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Karsten D. Johannesen, Víkavegur, 700 Klaksvík og Atli S. Justinussen, 727 Árnafjørður.
**Nevnd:** Karsten D. Johannesen, Víkavegur, 700 Klaksvík (formaður)
**Stjórn:** Atli S. Justinussen, 727 Árnafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av nevndini og einum stjóra.
**Grannskoðari:** Búskaparstovan v/ Finnur Sivertsen, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 21.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka grillsølu, matstovu, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 3. apríl 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2249, Sp/f Á Marknoyri, 900 Vágur.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Ingrid Kirstine Jacobsen, 370 Miðvágur.
**Innkomin í nevndina:** Súsanna Kristina Lindenskov, 900 Vágur.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Ingrid Kirstine Jacobsen, 370 Miðvágur.
**Innkomin sum stjóri:** Súsanna Kristina Lindenskov, 900 Vágur.

*Skráseting Føroya tann 3. apríl 2003*

*Kristin Balle*

---

www.sosialurin.fo


LISTASTEVNA FØROYA 2004 • 6.-16. august

**SKALDSØGUKAPPING**

Listastevna Føroya bjóðar við hesum til kapping
at skriva nýggja, føroyska skaldsøgu.

Handritini skulu ikki hava verið almannakunngjørd áður

Skaldsøguhandritini skulu verða latin
Listastevnu Føroya í seinasta lagi 1. mai 2004.

Ein dómsnevnd metir um tey innkomnu handritini.
Í dómsnevndini sita: Katrin Næs, studentaskúlalærari,
Turið Kjølbro, cand.phil í norðurlendskum bókmentum
og Bergur Hansen, mag.art í norðurlendskum bókmentum.

Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Handritini skulu verða í minsta lagi 75 A-4 síður til støddar,
tey skulu vera skrivað soleiðis, at frástøðan ímillum reglurnar
er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya
í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Handritini skulu verða send á tann hátt, at inni í brævbjálvanum,
sum handritið verður sent í, verður lagdur ein afturlatin
brævbjálvi við navninum á skaldsøguni og á henni/honum,
sum skrivað hevur.

Í virðisløn verða latnar kr. 150.000,- fyri besta handritið.

listastevna føroya art festival
Norðurlandahúsið í Føroyum • Box 1260 • FO-110 Tórshavn

LISTASTEVNA FØROYA 2003 • 7.-17. august

**YRIKINGAKAPPING**

Listastevna Føroya bjóðar við hesum til kapping
at skriva nýggjar, føroyskar yrkingar.

Yrkingarnar skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Handritini skulu verða latin Listastevnu Føroya
í seinasta lagi 1. mai 2003.

Ein dómsnevnd metir um tær innkomnu yrkingarnar.

Í dómsnevndini sita: Høgni Djurhuus,tíðindamaður,
Bergljót av Skarði, studentaskúlalærari og Kim Simonsen,
cand. phil í norðurlendskum bókmentum.

Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Handritini skulu verða skrivað soleiðis, at frástøðan
ímillum reglurnar er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya
í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Handritini skulu verða send á tann hátt, at inni í brævbjálvanum,
sum handritið verður sent í, verður lagdur ein afturlatin brævbjálvi
við navninum á yrkingini/yrkingunum og á henni/honum,
sum skrivað hevur.

Í virðisløn verða latnar kr. 5.000,- fyri hvørja av teimum
10 bestu yrkingunum.

Hesar yrkingarnar vera lisnar í Útvarpi Føroya, í táttinum
*listastevnuyrkingin 2003* - ein yrking um dagin, meðan listastevnan stendur.

listastevna føroya art festival
Norðurlandahúsið í Føroyum • Box 1260 • FO-110 Tórshavn